## Sætta hvør fyritøka hótt av húsagangi

Sjælland og danski høvuðsstaðurin eru ringast fyri, tá talan er um fyritøkur sum kunnu fara í gjaldssteðg orsakað av fíggjarkreppuni. Hetta vísir ein kanning sum kreditt- og analysufyritøkan Experian hevur gjørt. Sambært kanningini hava 17 prosent av donsku fyritøkunum nú eina fíggjarstøðu, sum ger at tær kunnu verða hóttar av húsagangi. Hetta er hægsta talið seinastu 11 árini, ið slíkar kanningar hava verið gjørdar. Hevur ein fyritøka bæði undirskot og ein hóttan eginpening, er stórur vandi fyri húsagangi. Bestu ráðini hjá slíkum fyritøkum eru at hava tætt samband við ráðgevarar eins og støða má takast til, hvørt fyritøkan eigur at halda fram ella ikki.



# heimskortið



*Fuglafjarðar kommuna hevur brúkt nógvar milliónir í íløguna við oljuhavnina. – Vit fara at fáa nógvan pening frá hesum virkseminum í kommunukassan longu komandi ár, væntar borgarstjórin, Sigurð Simonsen*

## Skip úr 13 londum

Síðani Faroe Bunkers byrjaði at selja tungolju í summar hava skip í ymiskum støddum og úr mongum ymiskum londum ligið við bryggju í Fuglafirði.

Sambært einum yvirliti hava skip úr so ymiskum londum sum Malta, Panama, Ruslandi, Bahamas, Grønlandi, Antigua&Barbuda, Spania, Týsklandi, St. Vincent, Noregi, Danmark og Føroyum vitjað.

Týsdagin í farnu viku kom eitt skip úr Monrovia í afrikanska landinum Liberia eftir olju í Fuglafirði. Íalt hava 30 skip keypt tungolju hiðani.



*Skip úr 13 ymiskum londum hava longu keypt tungolju frá Faroe Bunkers í Fuglafirði. Týsdagin í farnu viku vitjaði 84 metrar langa farmaskipið »Antarois Breeze« úr liberiska høvuðsstaðnum Monrovia*

fyri at virksemið kann økjast enn meiri.

Virksemið hjá Faroe Bunkers var í fyrstu syftu grundað á føroysk og russisk skip, men seinastu tríggir mánaðirnir hava longu víst, at skip úr øðrum londum eisini vilja til Fuglafjarðar at keypa olju:

Ikki færri enn 30 skip úr íalt 12 ymiskum londum hava keypt olju hiðani.

- Hesa tíðina eru farin omanfyri 25.000 tons av tungolju um bryggjukantin, og tí mugu vit bara staðfesta at Faroe Bunkers hevur fingið eina sera góða byrjan, slær borgarstjórin í Fuglafirði fast.

### Samstarv

Áðrenn Faroe Bunkers lat fyrstu oljuna, var eitt stórt fyrireikingararbeiði gjørt. Hetta varð av fyrstu tíð eitt samstarv millum stóru vinnuvirkini Havsbrún við sínum framleiðslum og Bergfrost við síni frystigoymslu í Fuglafirði.

Hjá Bergfrost var stórur áhugi í at fáa russisk skip at leggja veiðuna upp hjá teimum, men ein sá samstundis at neyðugt var at kunna veita teimum aðrar tænastur í sama viðfangi – millum annað oljusølu.

Saman við øðrum og góðum íleggjarum úr nærumhvørvinum vórðu so stig tikin til hesa oljusøluna, sum Fuglafjarðar kommuna umvegis Fuglafjarðar Havn eisini gjørdist ein partur av.

At so fleiri skip hava skift ella fara at skifta yvir til tungolju í framtíðini, hevur eisini gjørt sítt til at nýggja fyritøkan hevur fingið so góða byrjan.

- Vit síggja ein serligan áhuga millum farmaskip og leysfarmaskip. Enn hava vit ikki sæð nøkur bingjuskip, men tey munnu fara at koma, vónar Sigurð Simonsen.

### Pengar í kommunukassan

Tað hevur sjálvandi verið ein kostnaðarmikil íløga hjá Fuglafjarðar Kommunu at gera sítt til, at Faroe Bunkers kundu fáa bestu umstøður at virka undir.

Íalt hevur kommunan sjálv brúkt 16 mió krónur í hesa íløguna, umframt tann størra partin sum íleggjararnir hava brúkt til hesa ætlanina.

Kommunan hevur ábyrgd av at fyribyrgja dálking og í ringasta føri at basa dálking. Til hetta krevst útgerð til tilbúgving, og hevur henda kostað umleið 2 mió krónur.

- Men tað er eingin ivi um, at virksemið hjá Faroe Bunkers fer at geva fleiri milliónir í kommunukassan longu komandi ár, staðfestir ein nøgdur borgarstjóri í Fuglafirði.